

# Nú kann byggjast í Klaksvík

Innlendismálaráðið hevur nú góðkent endurskoðaðu almennu byggisamtyktina fyri Klaksvíkar. Í longri tíð hava tey í Klaksvíkar kommunu bíðað eftir góðkenningini frá Innlendismálaráðnum, men mikudagin 17. september bragdaði loksins. Almenna byggisamtyktin fyri Klaksvíkar kommunu er nú samtykt, og hetta merkir, at fleiri arbeiðir í kommununi sostatt kunnu fara í gongd. Endamálið við býarplaninum er at leggja karmar fyri framtíðar bygging í Klaksvíkar kommunu, har býarplanurin er eitt amboð til at seta kósina og stýra menningini av býi og bygdum kommununnar. Býarplanurin er ein ætlan, sum vísir á møgulig øki, ið kunnu brúkast til býar- og bygdamenningina tey komandi tjúgu árini. Ætlanin byggir á metingar og framrokningar av, hvussu stórum økjum brúk verður fyri til bústaðir, vinnu, stovnar o.s.fr., samstundis sum atlit eru tikin til landslag, verandi bygging, veðurlag og ferðsluviðurskifti. Yvirskipað er visiónin, at Klaksvíkar kommuna skal verða atdráttarmikil fyri nýggjar íbúgvar og virkir eins og ferðafólk. Býarplanurin liggur frammi í Miðlan og verður teldutøkur á heimasíðu kommununnar í næstum.



*Nú nýskipaða samgongan hevur sett sær fyri, at Skálafjarðartunnilin skal byggjast av privatum, væntar nevndin í P/F Skálafjarðartunlinum sær fundarboð at røða um eina møguliga avtalu millum partarnar*



*- Eg dugi onga orsøk at síggja til at gera málið um Skálafjarðartunnilin meira trupult, enn tað nýtist at vera, og eg dugi heldur ikki at skilja óttan hjá myndugleikunum í hesum máli, sigur Kristian Petersen, stjóri í P/F Skálafjarðartunlinum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Monika og Fiona í Fuglafjarðar kirkju

**Hóskvøldið í næstu viku fara Monika Stauss Joensen og Fiona Bechmann at hava konsert í Fuglafjarðar kirkju. Tær fara at framføra á violin og flygul, og eftir konsertina verður boðið til kaffi og hugnaligt prát**

KONSERT

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tær eru báðar kendar á tónleikapallum í Føroyum. Monika Stauss Joensen, sum hevur sínar røtur í Sveits og er gift Ingvardi Joensen í Leirvík og Fiona Bechmann, sum kemur úr London og er gift Torben Bechman.

Tær báðar høvdu fleiri konsertir saman, meðan Fiona búði í Føroyum. Tær framførdu bæði í Føroyum og London. Sambandið teirra millum hevur verið varðveitt alla tíðina, og nú kemur Fiona so aftur á tónleikavitjan, har tær báðar fara at hava konsert í Fuglafjarðar kirkju hóskvøldið 9. oktober klokkan 20.

Eftir konsertina verður boðið til kaffi og hugnaligt prát, og øll eru hjartaliga vælkomin.



*Monika Stauss Joensen (mynd) og Fiona Bechmann, sum ávikavist spæla á violin og flygul, fara at hava konsert í Fuglafjarðar kirkju hóskvøldið í næstu viku*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Kend í Føroyum

Føroyska tónleikasøgan fevnir eisini um fleiri útlendsk nøvn, sum føroyingar munnu kenna sum "síni egnu". Ein av hesum er Willy Gohl úr Sveits, sum tíðliga kom higar til lands at ríka føroyskt tónleikalív, og í Føroya Musikkskúla hava mangir útlendskir tónleikarar neglt sítt navn í føroysku tónleikasøguna.

Millum teirra, sum hava sett síni fingramerki innan føroyskt tónleikalív, er eisini Fiona Clark, sum giftist Bechman. Hon er útbúgvin pianistur og celloleikari frá Trinity College of Music í London.

Fiona arbeiddi sum lærari í Føroya Musikkskúla árini 1986-1989, og hon gjørdi eisini fleiri útvarpssendingar um tónleik. Hon hevur spælt í Føroyar Symfoniorkestri, har hon eisini møtti manni sínum, Torben Bechman, sum leikaði trombone.

### Vitjar Moniku

Torben er hálvur føroyingur og hálvur dani. Tey búgva nú saman við børnunum sínum, Alex, Sebastian og Natalie, í Onglandi.

Meðan Fiona er á tónleikaferð í Føroyum og er gestur hjá Moniku í Leirvík saman við 12 ára gomlu dóttir síni, Nataliu, vitjar maður hennara familju sína í Suðuroy saman við soninum, Sebastian.

Á konsertini í Fuglafjarðar kirkju fara tær báðar eitt nú at framføra verk eftir Mozart, Mendelssohn, Grieg og Hubay.